# Felagið Høganes rundar tey 20

HUGLEIÐINGAR

*Dánjal Petur Højgaard, skrivari í Felagnum Høganes*

Í tínum lívi setur tú tær nøkur mál. Nøkur teirra verða nádd, men onnur ikki. Hvussu bleiv so við sjóferðini við sluppini Høganes, ið byrjaði fyri 20 árum síðani?

Hin 4. juni í 1984 varð Felagið Høganes stovnað. Stigtakarar vóru Hans Petur Weihe, Martin Olsen - ið báðir eru farnir foldum frá - og undirritaði. Endamálið var at varðveita seinastu sluppina í Eysturoynni sum eitt sjógripasavn uppi á landi. Og á henda hátt eisini at sýna forfedrum okkara virðing. - Teimum, ið við sluppunum sum vinnutóli, beinleiðis lyftu føroysku tjóðini úr miðaldarligari landbúnaðartíð, og til nútíðar fiskivinnutíð.

Í 80-árunum tyktist nærum onki ógjørligt. Vit fóru til verka við góðum treysti. Felagið fekk nógvar limir. Bygdirnar skiftust um at taka arbeiðstørn leygardagar, soleiðis at skipið bleiv avmonterað og ruddað. Tað gekk rímuliga væl at fáa fígging tilvega, soleiðis at vit kundu løna skipshandverkarum at innrætta skipið eftir tekning av Dia Nielsen, arkitekti. Í trý ár var arbeitt umborð við innrætting og umvæling. So kundu vit so smátt hava framsýningar umborð. Fyrst á Eystanstevnu. Um maritim viðurskifti, um skaldskap í sambandi við sjóvinnu. Síðani listaframsýningar. Eisini kom t.d. Tróndur Patursson - mæti listarmaðurin og ferðamaðurin - umborð at greiða okkum frá um ferð sína við Shu-Fu, bambusflakanum, yvir um Havið Kyrra. Jú, manga góða løtuna fingu vit umborð á Høganesi, tað er vist. - Okkurt fekst hóast alt fyri stríðið, vit høvdu. Átti her helst eisini at nevnt lippusteikina, ið Maria, kona Martin, sála, hjúklaði um okkum við, aftaná at Eystanstevnu-framsýningin var liðug og skuldi takast niður. Meðan bíðað varð eftir øki at seta skipið á, máttu vit royna at hava tiltøk umborð. Her komu ungfólk okkum til hjálpar. Við Justin Philbrow og Kára Sverrissyni á odda stovnaðu tey bólkin TÓNASJÓN, ið hevði til endamáls at skipa fyri tónleikatiltøkum og sjónleiki umborð. Tey høvdu fleiri framførslur og vandu eisini umborð. So við og við fingu tey samband við føroyska tónleikaheimin kring landið. Kristian Blak og øll tey góðu tónleikafólkini kring hann. Norðurlandahúsið, ið hvørt ár fekk listafólk til Føroya at framføra. Vit upplivdu so at siga allar tónlistagreinar: fólkatónleik, jazz, klassiskan, rokk, samiskan joik, kingo, indianskan sang - og alt harímillum.

So komu døpru 90-árini. Skuldu vit halda uppat við virkseminum? - Kortanei! Hildið varð áfram. Mitt í allari neyðini kundu vit framvegis her á Skálafjørðinum stytta okkum stundir við forvitnisligum dygdarkonsertum av alskyns slagi.

Túsundárið skifti. Ikki bert til tað betra. Vit upplivdu óhapp og herverk. - Skuldu vit gevast av tí grund?- Aftur eitt »kortanei«! »Nei, vit seta stubbarnar í jørðina og berjast ikki minni«, sum kappakvæðið sigur.

Virksemið umborð á Høganesi helt fram. Og tað vaks eisini. Eldri sjómenn hittust har seinnapartar á degi. Eitt ungdómsfelag aftrat varð stovnað við endamálið at ung kundu hittast og hugna sær saman umborð. Skipið varð eisini nýtt sum undirvísingarhølið innan sjóvinnu hjá framheildsdeildunum við Runavíkar og Tofta Skúla.



Strongt hevur verið á at fáa eina loysn á málinum við at fáa øki til skipið. Hetta gongur tó framvegis striltið.

At fara og samanbera sjóferð okkara við ferðina hjá Oddyseus, er kanska at taka munnin ov fullan. Men hann fekk so eisini eina ferð, ið kom at vara nógv longri, enn væntað og ætlað. Hóast tað, so kom hann á mál. - Og tað ætla vit eisini!

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 24, 2004
www.kaupthing.fo

# Alsamt fleiri arbeiðslpláss verða sett á stovn

MARKNAÐARRÁK

Bjarta arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA fríggjadagin og semjan millum OPEC-limirnar hósdagin, um at økja oljuframleiðsluna, fingu lánsbrævarentur og partabrøv at hækka. Rentan á donsku 2- og 10 ára statslánsbrøvunum hækkaðu í ávikavist 2,8% og 4,57%.

Frágreiðingin staðfesti, at heili 248.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn í mai mánaða í mun til tey væntaðu 225.000. Síðan ársbyrjan eru nú 1,2 milliónir nýggj arbeiðsplass stovnsett; serliga innan framleiðsluvinnuna. Hetta staðfestir, at amerikanskar fyritøkur endiliga hava fingið álit á búskaparvøkstin, sum byrjaði seinast í 2001.

Góð búskapartøl og onnur tíðindi, ið hava fingið lánsbrævarenturnar at hækka, hava í seinastuni fingið partabrøv at lækka av ótta fyri komandi rentuhækkingini. Hesuferð háttaðu partabrøvini sær tó øðrvísi, tí marknaðirnir hava innroknað rentuhækkingina í USA, ið mest sannlíkt verður framd 30. juni.

Oljuprísurin, ið seinastu vikurnar hevur havt stóra ávirkan á virðisbrævamarknaðirnar, er vorðin meiri støðugur nú OPEC-limirnir hósdagin samdust um at økja framleiðsluna við 2 mió. tunnum um dagin og 0,5 mió. afturat um neyðugt. Hóast yvirgangsatsóknir mótvegis oljuútbúnaði kann ávirka oljuprísin í stutta tíðarbilinum, so stavar høgi oljuprísurin grundleggjandi frá stóra vøkstrinum í heimsbúskapinum. Serliga er eftirspurningurin úr USA og Kina øktur. Tískil kan ikki væntast, at príslegan á olju fer at lækka munandi í næstum, hóast oljuprísurin lækkaði 9% í farnu viku av OPEC tíðindunum.

Fá búskapar- og roknskapartíðindir verða hesa vikuna. Tískil verður tað heldur gongdin í oljuprísinum og røða hjá Grennespan hósdagin, ið kunnu ávirka. Lækkingin í oljuprísinum í farnu viku kann føra við sær eina stuttíðar mótrørðslu, og ein slík kann føra við sær lækkandi partabrøv og lánsbrævarentur. Rákið í láns- og partabrøvunum frá farnu viku skal tó væntast at halda fram.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig | |
|---|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% | → |
| 2 ára lánsbræv | 2,80% | 0,10% | ↑ |
| 5 ára lánsbræv | 3,95% | 0,12% | ↑ |
| 10 ára lánsbræv | 4,57% | 0,08% | ↑ |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| KFX, Danmark | 260,9 | 3,0% | ↑ |
| OMX, Svøríki | 691,3 | 2,6% | ↑ |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.713,1 | 1,6% | ↑ |
| S&P 500, USA | 1.122,5 | 0,2% | ↑ |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 103,99 | -0,3% | ↓ |
| Evru Lánsbrøv | 164,62 | -0,3% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 77,13 | 0,8% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 62,80 | -1,0% | ↓ |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 603,41 | -1,1% | ↓ |
| EUR | 743,38 | 0,0% | ↑ |
| GBP | 1.110,17 | -0,7% | ↓ |
| NOK | 90,65 | 0,1% | ↑ |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Hundraðtals arbeiðspláss hvørva

**At alivinnan í Føroyum er í svárari kreppu, er neyvan nøkur loyna, og við nýggjastu hagtølunum hjá Fiskaaling í huga, er líkt til, at nógv fólk, ið starvast í alivinnuni, verða uppsøgd**

ALIVINNAN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað sær einki út hjá føroysku alivinnuni. Ein samanrenning av ILA-sjúku og vánaligum prísi á heimsmarknaðinum hevur sett síni spor, og tey útvið 800 fólkini, ið starvast innan føroysku alivinnuna, eru í vanda fyri at missa arbeiði.



*Fleiri hundraðtals arbeiðspláss eru í vanda, nú føroyska alivinnan er í svárari kreppu*

*Savnsmynd*

### Næstan einki smolt sett út

Eitt gott tekin um vánaligu støðuna í alivinnuni, er markanta afturgongdin í nøgdini av smolti, ið verður sett út. Í 2002 vóru ikki færri enn 18 milliónir laksasmolt sett út, meðan metingarnar hjá Fiskaaling fyri í ár siga, at tað neyvan verður meiri enn einar 2 milliónir av laksasmolti sett út í ár. Hetta er tað lægsta talið av smoltið, ið verður sett út, síðani 1986. Í fjør vóru 7.5 milliónir laksasmolt sett út, so ikki kann sigast annað, enn tað hevur gingið ógvuliga skjótt tann skeiva vegin.

### Tøkan av laksi fer í botn

Við tað at smoltið vanliga verður tikið innan tvey ár eru farin, er eyðsæð, at tey næstu árini verður nógv minni virksemi á teimum ymisku kryvjivirkunum kring landið. Nýggjar metingar, ið Fiskaaling hevur gjørt vísa eisini, at tøkan av laksi fer at minka munandi næstu árini. Í kruvdari vekt var tøkan størst í 2001, tá ið 41.000 tons av laksi vóru tikin, og hetta talið er minkað eitt sindur fyri hvørt ár, ið er farið aftur um bak, soleiðis at tað væntandi verða tikin 34.000 tons av laksi í ár. Hyggja vit so eitt lítið ár. Hyggja vit so eitt lítið sindur longur fram í tíðina, er fallið í tøkuni væl størri. Lítla útsetingin av smolti hevur við sær, at tað komandi ár væntandi ikki verða tikin meiri enn okkurt um 20.000 tons, og árið eftir í 2006 einans 6.000 tons.

### Nógv arbeiðspláss í vanda

Við omanfyri nevndu metingum í huga, er lítið at ivast í, at tað verða nógvar uppsagnir í vinnuni. Serliga kann roknast við, at tað er innan fyri kryvjing og framleiðsluna av liðugtvøru, at nógv verða uppsøgd. Í einum tilmæli, sum Vinnuhúsið lat gera fyrr í ár, stendur at lesa, at okkurt um 500 fólk arbeiða innan fyri hesar báðar partar av føroysku alivinnuni. Aðrastaðnis í blaðnum stendur at lesa, at Sørvágs Laks júst hevur sagt fólki úr starvi, og væntast kann, at tað sama fer at henda kring alt landið.

### Útflutningsvirðið minkar nógv

Vánaliga gongdin í alivinnuni fer sjálvsagt eisini at ávirka útflutningin av laksi. Seinastu árini hevur føroyska alivinnan útflutt fyri einar 800 til 900 milliónir krónur um árið. Í ár fer útflutningsvirðið neyvan at minka nevnisvert, men næstu árini sær verri út. Ein forsøgn, sum Føroya Havbúnaðarfelag hevur latið gjørt, vísir, at komandi ár fer føroyska alivinnan neyvan at útflyta fyri meiri enn slakar 500 milliónir krónur, og í ár 2006 verða vit heilt niðri á 100 milliónur krónum. Hesar metingar eru gjørdar út frá teirri nøgd, ið væntandi verður tikin komandi árini, og roknað er við einum marknaðarprísi upp á 20 krónur fyri kilo. Í løtuni liggur miðalprísur beint undir 20 krónum fyri kilo.

### Líkist kreppuni í nítiárunum

Kreppan í alivinnuni í dag minnir ikki sørt um kreppuna, sum alivinnan var í fyrst í nítiárunum. Men av tí at vinnan er nógv størri í dag, kenst kreppan eisini svárari í samfelagnum.

Orsøkin til kreppuna í nítiárunum var vánaligir prísir og sjúka, og tað er júst tað sama, sum ger seg galdandi í dag. Nógvir alarar fóru á húsagang tá, og søgan fer óivað at endurtaka seg. Hvussu stór kreppan verður hesaferð, er tó nógv tengt at, hvussu tað fer at ganga við at fáa bast sjúkunum, og hvørjar karmar, ið landsins myndugleikar og fíggjarstovnar fara at geva føroysku alivinnuni.

Vit royndu til fánýtis at fáa eina viðmerking frá Havbúnaðarfelagnum til støðuna í føroysku alivinnuni, men vónandi kemur hon í næstum.

## VIÐMERKING

# Kæra um formannin í Búskaparráðnum

**Føroya Fiskimannafelag**
*Óli Jacobsen*



*7. juni 2004*
**Til**
**Jóannes Eidesgaard,**
**løgmaður**
**Bárður Nielsen,**
**landsstýrismaður**

Vit vilja við hesum heita á løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum um at seta eina kanning í verk, hvørt formaðurin í Búskaparráðnum hevur hildið seg innan sínar heimildir í samband við luttøkuna á fundinum, sum var í Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi herfyri um blokkstuðulin, og tað, sum er farið fram aftaná.

Sambært lógina um Búskaparráð er uppgávan hjá ráðnum at fylgja við búskaparligu gongdini í samfelagnum og at ráðgeva um búskaparlig viðurskifti.

Men lógin sigur einki um, at ráðið hevur nakran sum helst politiskan myndugleika, sum formaðurin sjálvur tykist at halda, at fáa sínu sjónarmið gjøgnumførd. Tað er væl saktans upp til tann til eina og hvørja tíð valda politiska myndugleika, hvørt hann fylgir ráðgevingini frá ráðnum ella ikki. Vit rokna við, at Búskaparráðið hevur ikki annan status enn aðrar ráðgevandi nevndir, sum t.d. Fiskivinnuráðið.

Orsøkin til hesa kæru er leikluturin hjá formanninum í Búskaparráðnum í teirri donsku uppílegging í innanhýsis føroysk viðurskifti, sum vit júst hava sæð í hesum døgum.

Hetta kom greitt fram í Berlingske Tidende seinasta fríggjadag, har formaðurin í fíggjarnevndini hjá danska fólkatinginum, Kristian Thulesen Dahl, nýtir skattaskipanina hjá føroyskum sjó- og fiskimonnum sum páskot fyri kravi um at endurmeta danska blokkin til Føroya.

Hetta minnir sera nógv um ta uppílegging í føroysk viðurskifti, sum vit sóu undir kreppuni fyrst í 90-unum, tá tað eisini vóru fiskimenn, sum stóðu fyri skotum.

Tá høvdu vit eina kenslu av, at donsku krøvini vóru bíløgd úr Føroyum. Men í hesum førinum er tað púra greitt, at tað eru føroyskir myndugleikar, sum standa aftanfyri, og at tað er teimum fyri at takka, at málið kemur fram á hendan hátt. Endamálið er greitt umvegis danskar myndugleikar leggja trýst á teir føroysku á einum øki, har vit einsamallir hava ræðið, og hetta er í sær sjálvum ein sera álvarslig hóttan ímóti føroyska suverenitetinum ella sjálvræðinum.

Tað framgongur greitt av greinini í Berlingske Tidende, at tað er Hermann Oskarsson í sínum eginleika av at vera formaður í Búskaparráðnum, sum er upprunin og orsøkin til henda ágang móti føroyskum sjálvræði.

Umframt tað er grund til at halda, at tað er hann, sum hevur forsýnað sovæl danskar fjølmiðlar sum politikkarar við teimum faktuellu upplýsingum, sum eru í málinum. Hetta er gjørt á ein slíkan eintáttaðan hátt, at tað verður uppfatað av dønum sum »afsløring af lønfesten«, sum um nakað er gingið fyri seg, sum ikki tolir dagsins ljós. Hetta verður gjørt saman við eini sera vanvirðandi umrøðu av føroyskum fiskimonnum.

Vit ætla ikki at koma inn á sjálva argumentatiónina her, hóast nógv kundi verið sagt. Men tó hetta: Sjálvsagt vilja vit ikki leggja okkum út í eitt kjak um blokkin. Men vit ætla ikki at góðkenna, at tað verður róð uppundir, at tað skulu vera fiskimenn, sum eru orsøkin til, at føroyskur búskapur ikki er sjálvberandi. Og tað serstakliga teir fiskimenn, sum geva størsta íkastið til búskapin. Hetta sigur nakað um støðið og mannagongd i hesi sak.

Men vit meta tað at vera sera álvarsligt, at ein týðandi almennur embætismaður alment á ein slíkan hátt beitir danskar leiðandi politikkarar eftir okkum við slíkum hóttanum, tá embætismaðurin ikki sjálvur fær føroyskar myndugleikar at »makka rætt«. Vit meta tað at vera sera ivasamt, um ein slík mannagongd kann vera innanfyri hansara heimildir sum formaður í Búskaparráðnum við teirri vekt, sum liggur aftanfyri, tá sjónarmið verða sett fram í hesum eginleika.

Vit meta tað eisini at vera ivasamt, um verandi formaður í Búskaparráðnum yvirhøvur situr har lógliga. Í lógini um Búskaparráð er ásett, at formaðurin fyri ráðið ikki kann hava »leiðandi starv innan meginfyrisitingina«. Sum kunnugt er formaðurin samstundis stjóri á Hagstovuni, sum enntá húsast í Fíggjarmálaráðnum. Hetta meta vit eisini at vera eitt álvarsmál, tí ivamál á hesum øki kann seta enn eitt spurnartekin til tey tilmæli, sum Búskaparráðið kemur við.

Vit vóna at frætta aftur sum skjótast, so álit aftur kann skapast á landsins myndugleikar, íroknað Búskaparráðið.